# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Sólja í Ólastovu 50 ár



Sunnudagin 18. oktober verður Sólja í Ólavstovu 50 ár. Hon er dóttir Katrin, ættað úr Kaldbak, og Ólav Michelsen, ættaður úr Øravík. Ólavur var kendur sum blaðstjóri á 14. September og sum býráðslimur í Havn.

Tey bæði áttu fimm døtur, og Sólja er næstelst. Sólja fór eftir studentsprógv niður at lesa løgfrøði, og fekk hon prógv í 1985. Hon kom aftur til Føroya og var fram til 1987 fulltrúi á landsskúlafyrisitingini. Síðan var hon eitt ár stjórnarskrivari í Føroya Banka.

Men tá gekk leiðin til Grønlands, har hon í 1988 gjørdist fulltrúi í grønlendska heimastýrinum. Í 1992 gjørdist hon skrivstovustjóri í lógardeildini, seinni í innlendis- og lógardeildini, og í 2002-2003 var hon forstjóri í grønlendska heimastýrinum.

Hennara samband við Grønland kom fyrst og fremst av, at hon hevði fingið grønlendskan mann Niels Petersen. Saman við honum eigur hon børnini Ivalu og Janus.

Sum tað skilst hevur Sólja verið væl umtókt í Grønlandi, og koma grønlendsku "spíssarnir" á vitjan, so vitja teir eisini Sólju og øvugt, tá ið hon vitjar í Grønlandi.

Í Grønlandi er landsstýrið partur í nógvum vinnufyritøkum, og Sólja umboðaði eisini landsstýrið í nevndini fyri bryggjarínum Nuuk Imeq, har hon eisini var formaður. Her var í hvussu er eingin kreppa. Tað eina árið seinast í 1990-unum var avlopið 36 milliónir krónur, fyrst og fremst takkað ein vøkstur uppá 71% í sodavatnsframleiðsluni!

Men leiðin gekk aftur til Føroya, og í 2003 verður hon aðalstjóri í almannaráðnum. Men longu eftir valið í 2004 verður heilsumálaráðið og almannaráðið løgd saman, sum tey høvdu verið frammanundan, og tá gerst Sólja deildarstjóri í Fiskimálaráðnum

Har komu vit at hava samskifti millum annað í fiskivinnuráðnum, og Sólja vísti seg at hava ta rættarfatan, sum ofta hevur verið ein saknur í okkara skipan.

**Umboðsmaður**

Í 2005 fær Sólja tann stóra heiður, at eitt samt ting biður hana um at taka við sum løgtingsins umboðsmaður frá ársbyrjan 2006, og hetta starv røkir hon nú.

Tað er einki at ivast í, at hetta er eitt av teimum týdningarmestu størvunum í landinum. Tað kann í Føroyum vera trupult at vita, hvat ið vendur upp og hvat ið vendir niður í løgfrøði við teimum mótstríðandi útmeldingum sum ofta koma. Tí er tað týdningarmikið, at vit hava eina lógarmyndugleika, sum er oman fyri hinar, og sum bæði hevur eina rættar- og rættvísiskenslu, sum er frammarlaga.

Tað tykist eisini, sum at Sólja hevur hesar eginleikar. Tær niðurstøður, sum koma frá henni, tykjast eisini at vera skilagóðar. Hildið verður kanska, at tær ikki altíð hava so stóra ávirkan. Men her er størsta uppgávan at fáa eina hugburðsbroyting hjá almennum myndugleikum. Royndirnar vísa, at hetta kemur at taka sína tíð. Men her kann tað bert ganga tann rætta vegin.

Tá ið Sólja flutti til Føroyar var tað saman við manninum Niels. Men hann var sjúkur og doyði stutt eftir.

Seinastu árini hevur Sólja hildið saman við Jóhann Mortensen, útvarpsmanni, og tey búgva í barnaheiminum hjá mammu hennara í Kaldbak.

Tey hava nógv til felags. Johan er kendur sum náttúrumenniskja, og tað er Sólja so sanniliga eisini við gongu- og ríðitúrum.

So er Sólja eisini "sjómaður." Hon hevur dugnaskapsprógv í sigling og fer javnan á flot millum annað út á Hoyvíksgrynnuna. Hennara nærmastu siga, at hon er nærum ein fiskiklógv, og hon hevur sett sær fyri at vera sjálvforsýnandi við frikadellum, og tað er hon eisini!

Sosialurin ynskir Sólju tillukku við teimum 50 árunum.

**ó.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Turið Dahl**, ættað úr Havn, búsitandi í Ballerup, ferð til gravar úr Skovvejskirken, Digterparken 1 í Ballerup, leygardagin kl. 14.30.

**Hans Sørensen**, ættaður úr Trongisvági búsitandi í Tórshavn, andaðist í heiminum týsdagin 82 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 19. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju leygardagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Hans, kunnu lata hjartafelagnum eina gávu, konta í pengingastovnunum.

**Pauli Lassen**, vanliga nevndur Grethepauli, úr Vági, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 73 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 14 til Smyril. Jarðarferðin verður úr Vágs Kirkju sunnudagin kl. 13, sungið verður úr sálmabókini. Tey íð vilja minnast Paula, kunnu lata Meinigheitshúsinum eina gávu, konta nr. 409.767.0 í Suðuroyar Sparikassa.

**Lítla Ró**, dóttir Margret og Jóhan David Joensen, Klaksvík, andaðist í heiminum mikumorgunin, 6 ára gomul. Jarðarferðin verður úr heiminum leygardagin klokkan 13.30. Bønarhald verður í Emmaus á veg í Betesda. Tey ið vilja minnast Ró kunnu lata Zarepta ella Leguhúsinum í Nesvík eina peningagávu.

**Hans Petur Lamhauge**, Lamba, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 69 ára gamal. Farið verður frá Landssjúkrahúskapellinum leygardagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Glyvra Kirkju sunnudagin klokkan 14.

**Archibald Norðberg**, ættaður úr Hvalba, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósnáttina, 87 ára gamal.

**Hildur Isholm** fer til gravar frá Prestebo kirkju í Herlev týsdagin 20. oktober klokkan 13.30.

**Anna Midjord**, Vági, ættað av Økrum, andaðist á landssjúkrahúsinum mánamorgunin, 63 ára gomul. Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 17 umborð á Smyril. Jarðarferðin verður úr Betel í Vági til kirkjugarðin á Leiti, leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata Traktatgrunninum eina gávu, konta í peningastovnunum.

## Føðingar

26. september fingu Joan og Alexandur Abrahamsen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3250 gr.

7. oktober fingu Tanja Lið Johansen og Allan Eiriksson, Miðvági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3650 gr.

9. oktober fingu Kristianna Poulsen og Jens Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3950 gr.

9. oktober fingu Ingva og Ragnar Sørensen, Trongisvági, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr.

10. oktober fingu Bergitha Vestergaard og Eron Winther, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3800 gr.

11. oktober fingu Harriet Hansen og Jónleif Samuelsen, Haldórsvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3225 gr.

12. oktober fingu Barbara S. Joensen og Sámal Joensen, Streymnesi, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4400 gr.

12. oktober fingu Lív Lenvig og Harry S. Jacobsen, búsitandi í Keypmannahavn, eina dóttur á Hvidovre Hospitali. Hon vigaði 3550 gr og var 52 cm long.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á mínum 65 ára føðingardegi.

*Heilsan*
**Kitty Gudmundsen, Vágur**

### Silvurbrúdleyp

Leygardagin 17. okt. kunnu hjúnini Aud og Siggvard, Joensen, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum: Lauritsargøta 7, Tórshavn, frá kl. 17.

### Gullbrúdleyp

Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 20. okt. verður Hildigarð Høghamar, Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 24. okt. á Hotel Eiði Frá kl. 18. Tey, ið vilja heilsa uppá Hildigarð verða biðin at siga frá á tlf. 423045 (Hildigarð), 283541 (Annsy), 229727 (Nomi) áðrenn 17. okt.

### 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 18. okt. fyllir Poul Jacobsen, Svínoy, 90 ár. Dagurin verður hildin úti í Svínoy leygardagin 17. okt. kl. 19.

## Dagurin

16. oktober. Gallus, deyður á 640. Írskur munkur, sum læt kleystrið St. Gallen við Bodenvatnið byggja. Doyði 95 ára gamal.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og bróðir

**Dánjal Johan Lisberg**
Tórshavn
búsitandi í Danmark

andaðist á Ríkishospitalinum
14. oktober 2009, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju.
Kunngjørt verður nærri.

*Familjunnar vegna*
**Malan, Jens, Hans, Hallur, Miriam, Sigurðjón og Eli**

Tey, ið ynskja at minnast Dánjal Johan, kunnu lata eina gávu, konta í Eik Banka.